Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Útbúgvingar á rúsevnaøkinum

Spurningar:

1. Arbeiðir Uttanríkis- og mentamálaráðið við at skipa útbúgvingartilboð á rúsevnaøkinum?
2. Um ja, hvørji?
3. Er nakað samstarv við Heilsumálaráðið og/ella viðgerðarstovnarnar um at skipa útbúgvingartilboð til starvsfólk á rúsevnaøkinum ?

Viðmerkingar:
Í mai 2019 samtykti eitt samt Løgting at taka undir við einum uppskoti, sum skipaði rúsviðgerðarøkið við lóg (ll. nr. 53 frá 7. mai 2019). Fyri at geva viðgerðarstovnunum tíð at liva upp til treytirnar í lógini varð gildiskoman sett til 1. januar 2020.
Í svari til skrivligan fyrispurning (SS-007-2020) frá undirritaða segði landsstýrismaðurin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, í vár, at stovnarnir enn ikki høvdu fingið góðkenning, men at arbeiðið var í gongd.

Rúsviðgerðarstovnarnir vóru positivir um uppskotið um at skipa økið í lóg, eins og allir hoyringarpartar tá tóku undir við, at tíðin var komin til at fáa lógarregulerað rúsviðgerðarøkið. Í lógini er ásett, at stovnarnir skulu liva upp til krøv um fakligar førleikar í starvsfólkahópinum umframt eina rað av øðrum viðurskiftum.

Endamálið við lógaruppskotinum var at styrkja viðgerðarstovnarnar, og at skapa størri virðing um, at stovnarnir veita viðgerð fyri bundinskap, sum av WHO er staðfest sum sjúka, og at sjúkuviðgerð er treytað av væl skikkaðum fakfólkum á økinum.
Tí varð eisini lagt upp til, at eitt gott eftirlit við stovnunum var ein púra natúrligur partur av at bøta um sjúklingatrygdina eins og fakligu krøvini til starvsfólkahópin.

Sum ein natúrlig fylgja av broyttu krøvunum veksur tørvurin á at fáa útbúgvin fólk at starvast á rúsevnaøkinum. Tí er spurningurin um hvussu Uttanríkis- og mentamálaráðið arbeiðir við hesum, og hvussu samstarvið er við Heilsumálaráðið.
Tað er onki at ivast í, at tað er møguligt at knýta seg afturat stovnum í grannalondunum til útbúgvingarnar, heilt ella partvíst, og tað ber til at skipa útbúgvingar í Føroyum eisini. Av tí at Uttanríkis- og mentamálaráðið er myndugleiki á útbúgvingarøkinum, er týdningarmikið at kenna ætlanirnar á økinum og hvat verður gjørt fyri at tryggja fakliga støðið.

Á Løgtingi, 27. september 2021

Sirið Stenberg